**Jörgen Niclasen**
**landsstýrismaður**

## Svar

## upp á

## fyrispurning nr. 50/2014 eftir § 52a í tingskipanini frá Kristinu Háfoss, løgtingskvinnu, um Det Systemiske Risikoråd

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hví mælir landsstýrið til at nýta Det Systemiske Risikoråd til at hava yvirskipað eftirlit við øllum tí føroyska fíggjargeiranum?
2. Metir landsstýrismaðurin tað vera rætt, at danskir myndugleikar skulu røkja eftirlitsuppgávu á fíggjarligum økjum, har føroyingar hava heimtikið ábyrgdina, herundir eftirlitsskylduna?
3. Hvør føroyskur stovnur røkir í dag uppgávuna, ið landsstýrið mælir til at lata til Det Systemiske Risikoråd?
4. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er nøktandi at lata upp í hendurnar á einum donskum ráði at røkja fíggjarligt váðaeftirlit við atliti til føroyska fíggjargeiran, føroyska búskapin og føroyska samfelagið?
5. Hevur landsstýrið kravt, at Føroyar fáa umboð í Det Systemiske Risikoråd?
6. Hví ikki lata ein endurstovnaðan Landsbanka Føroya røkja yvirskipaðu fíggjarligu eftirlitsuppgávurnar, ið nú verða lagdar til Det Systemiske Risikoråd í Keypmannahavn?

## Svar

**Ad. 1 og 3**
Fíggjarstovnar og eftirlit við slíkum er framvegis ikki yvirtikið málsøki. Tískil er bankageirin í Føroyum danskt málsøki og harvið undir danskari lóggávu, ið er sett í gildi í Føroyum. Sostatt er tað danska Fíggjareftirlitið, ið hevur eftirlit við føroysku bankunum.

Det Systemiske Risikoråd er ráðgevandi ráð, hvørs fremsta uppgávu er at meta um samlaða váðan í danska og føroyska fíggjarheiminum. Harumframt kann ráðið koma við tilráðingum til myndugleikarnar um átøk, sum ráðið metir kunna stuðla upp undir fíggjarligt støðufesti. Ítøkiliga er uppgávan hjá ráðnum

- at eyðmerkja og ansa eftir, tá tað snýr seg um systemiskar fíggjarligar váðar í Danmark og Føroyum,
- út frá eftiransingum at siga hugsan sína um systemiskar fíggjarligar váðar,
- at ávara um at byggja upp systemiskar fíggjarligar váðar,
- at mæla til átøk á fíggjarliga økinum, sum kunnu minka um ella fyribyrgja, at systemiskir fíggjarligir váðar verða uppbygdir og

- at ummæla ávaringar og tilmæli frá Europeisku Nevndini fyri Systemiskar Váðar (ECRB).

Ávaringarnar og tilmælini frá ráðnum skulu venda sær til danska Fíggjareftilitið, og, tá um lóggávu ræður, til donsku stjórnina og landsstýrið.

Eingin föroyskur stovnur hevur rikið ella rekur í dag uppgávuna, ið Det Systemiske Risikoråd fer at reka framyvir; men Hagstova Föroya ger í samstarvi við Danmarks Nationalbank MFI hagtöl. MFI er hagtöl yvir javna, fíggjarligu streymar og rentur hjá kredittstovnum. Hagtölini hjá Hagstovu Föroya fevna um föroysku stovnarnar, og endamálið er at ansa eftir fíggjarliga stöðufestinum.

**Ad. 2**
Bankar eru, sum nevnt omanfyri, undir donskum málsræði. Við broyting í lov om finansiel virksomhed, sum varð lýst í Danmark 19. desember 2012, varð nýtt ráð sett á stovn kallað Det Systemiske Risikoråd. Lögtingið samtykti somu lógarbroyting hin 5. desember 2014.

Spurt verður, um landsstýrismaðurin metir tað vera rætt, at ráðið eisini skal hyggja eftir tí partinum av fíggjarökinum, sum er undir föroyskum málsræði. Tað, sum spurt verður um her, er málsöki hjá landsstýrismanninum í vinnumálum. Spurningurin eigur tí at verða settur honum.

**Ad. 4**
Det Systemiske Risikoråd er ráðgevandi og skal fyribyrgja ella minka systemiskar fíggjarligar váðar, sum kunnu leggja búskaparligu gongdina undir trýst, heilt ella fyri ein part soleiðis, sum vit sóu tað undir seinastu fíggjarkreppuni. Partar av fíggjargeiranum eru enn undir donskum málsræði og koma tískil undir virkisökið hjá danska ráðnum. Sí í hesum sambandi eisini svarið upp á 6. spurning.

**Ad. 5**
Lógin sigur greitt hvussu Det Systemiske Risikoråd skal mannast, og Föroyar hava ikki umboð í ráðnum.

Í Danmark bleiv lov om finansiel virksomhed broytt m.a. 25. mars í 2014. Ein broytingin var, at Det Finansielle Råd bleiv avtikið, og nevnd sett í Fíggjareftirlitið í staðin. § 345, stk. 15 í lov om finansiel virksomhed er eftir lógarbroytingina soljóðandi:

> *Færöernes landsstyre og Grönlands selvstyre udpeger hver 1 særlig sagkyndig, som efter formandens beslutning kan deltage i bestyrelsens möder uden stemmeret.*

Áðrenn lógarbroytingina snúði ásetingin seg um Det Finansielle Virksomhedsråd, og orðingin var hin sama:

> *Færöernes landsstyre og Grönlands landsstyre udpeger hver en særligt sagkyndig, som efter formandens beslutning kan deltage i rådets möder uden stemmeret.*

**Ad. 6**
Det Systemiske Risikoråd hevur víðar heimildir og kann krevja at fáa upplýsingar frá Fíggjareftirlitinum, Nationalbankanum og øðrum myndugleikum. Ein føroyskur eftirlitsmyndugleiki hevði undir núverandi lóggávu ikki havt hesar heimildir. Skuldi ein føroyskur eftirlitsstovnur havt eins víðar heimildir og Det Systemiske Risikoråd, hevði helst verið neyðugt at yvirtikið málsøkið, alt sum tað er.

Argir, 13. februar 2015

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður